

*Emmy og Rikka í dag. Rikka arbeiðir á røktarheiminum Mørkini í Streymnesi. Emmy letur ikki illa at Grønlandsfonden eins og onnur hava gjørt*



*Mariann, dóttir Richard og Emmy, er í dag narkosulækni í Lund í Svøríki*

ár við KGH, sum greitt varð frá í grein í Sosialinum í 2007.

Í 1957 fer Óla Hendrik sum yvirstýrmaður við Disko, eitt av ferðamannaskipunum hjá KGH, sum sigldi millum Grønland og Danmark.

Tá ið tíðin nærkast, at Hans Hedtoft skal í drift er spurningurin hvør, ið skuldi sleppa við hesum nýggja skipi. Óla Hendrik skilti, at hann var á upprunaliga manningarlistanum. Men tað varð so avrátt, at teir yvirmenn, sum høvdu havt eftirlitið við byggingina av skipinum skuldu manna Hans Hedtoft í fyrsta umfari. Var okkurt at rætta uppá, so vóru teir best fyri í so máta.

Tann 3. januar 1959 kl. 12 verður Óli Hendrik saman við øðrum boðin umborð á Hans Hedtoft at "bese skibet og deltage i en frokost".

Tað gjørdi Óla Hendrik fegin. Ikki minst, tí hann kendi nógvar av manningini, sum hann hevði siglt saman við. Millum hesar eisini skiparan Poul Rasmussen, sum Óla Hendrik sigur hava verið eitt "praktfult menniskja." Hetta var seinastu ferð hann sá hesar menn.

Óla Hendrik fer við Disko úr Danmark tann 27. januar Teir eru á leiðini tvørs av Føroya Banka, tá ið teir frætta um neyðarkallið hjá Hans Hedtoft tann 30. januar. Tá ið teir komu um Kappaleiðina halda teir útkikk, um nakað er at síggja, men tá var øll vón veruliga slept.

Ein av teimum, sum fórst, var 2. stýrimaðurin Richard Jacobsen úr Sandvík. Óla Hendrik hevði siglt saman við honum við Disko. Ein dagin umborð sigur Richard, at hann fer at gevast við hesi sigling, tí hetta fer eina ferð at ganga galið. Men so fær hann møguleikan at sleppa við Hans Hedtoft, og ein slíkan kjans bar ikki til at siga nei til!

Ein annar føroyingur var eisini við. Hetta var tann 16 ára gamli Ólavur Guðjónsson. Hann skuldi fara í læru á skipasmiðju í Klaksvík. Foreldur hansara vóru búsitandi í Narsaq.

## Danmarkar ringa samvitska

Í Danmark verður sum rímiligt er gjørt nógv burturúr 50 ára minninum fyri hesa vanlukku.

Tað er skrivað ein nýggj bók um Hans Hedtoft. Hon eitur "Skibet der forsvandt" og rithøvundar eru brøðurnir Lars og Morten Halskov. Bókin fær sera góð ummæli í donskum bløðum. Her er nógv tilfar, sum ikki hevur verið frammi fyrr.

Tað verður sagt, at tað vóru tvær skandalir í hesum máli. Onnur var málið um Kjærbøl, sum longu er greitt frá.

Hin er viðferðin sum tey avvarðandi fingu aftaná. Aftaná vanlukkuna var skipað fyri stórari landsinnsavning i Danmark, eisini í Føroyum, til tey avvarðandi. Tað komu nógvir pengar inn, nevniliga 3,7 milliónir krónur. Hetta vildi svara til einar 75 mió krónur í dag. Tað var nokk so greitt, at hesir pengar skuldu nýtast at linna um hjá øllum teimum eftirsitandi, eisini í førum tá ið tann almenna hjálpin annars ikki rakk til.

Men tá ið gjaldast skuldi út var talan um eina við nútíðareygum slíka smáligheit móti teimum avvarðandi, at hetta í dag verður roknað sum ein skomm.

Sett var ein trýmannanevnd at umsita Grønlandsfondin, sum grunnurin kom at eita. Men grunnurin kom at leggja eina sera stramma linju. Høvuðsreglan gjørdist, at bert avarðandi hjá teimum við forsyrgjaraskyldu fingu nakað úr grunninum. Hesi vóru bert helvtin av teimum 95 sum umkomust. Hini fingu ikki eitt oyra, hóast ein veiting kundi fatast sum ein viðurkenning, sum kundi linna teirra sorg.

Og viðvíkjandi hinum fingu tey ofta sera eyðmýkandi viðferð. Tey eftirsitandi í Danmark skuldu møta upp á skrivstovuni hjá grunninum í Keypmannahavn, og her skuldu tey leggja alt á borðið um teirra fíggjarligu viðurskifti. So skuldi nevndin út frá tí meta um tørvin hjá viðkomandi.

Í summum førum var enntá slatur um fíggjarviðurskifti tikið við til skaða fyri umsøkjararnar.

Eitt annað dømi um smáligheitina var viðferðin av teimum eftirsitandi hjá 36 ára Carl Egede. Hann var limur í landsráðnum. Eisini átti hann ein rækjubát, og hann var ein ímynd av teimum, sum Grønland skuldu byggja sína framtíð á.

Einkjan Dorthea royndi sum frægast at reka bátin hjá manninum víðari. Men tað gekk ikki væl. Rækjuárið var annars eisini sera vánaligt í 1960. Tískil mátti báturin seljast við stórum tapi.

Eftir togan játtaði grunnurin einkjuni 3.700 árliga. Hetta var ein sjeyndingur av tí, maðurin hevði forvunnið.

Dorthea gjørdist sjúk av liðagigt og gjørdist meira og meira óarbeiðsfør. Hon fekk síðan staðfest lívmóðurkreft og doyði stutt eftir uttan at eiga nakað.

Grønlandsgrunnurin metti seg at eiga kr. 11.671 til góðar hjá hesi einkju. Men at avskriva hetta kom ikki uppá tal. Hann legði kravið inn fyri deyðsbúgvið í skiftirættinum. T.v.s. kravið varð sett fram móti fýra fátækum foreldraleysum børnum millum 11 og 19 ár. Hetta var ikki eindømi um, at tey eftirsitandi komu at liva í fátækradømi.

Tað var ikki tí, at peningur ikki var til í grunninum. Tað var bert ein lítil partur av honum, sum varð útgoldin til sítt høvuðsendamál, nevniliga tey eftirsitandi. Tá ið grunnurin varð avtikin og samanlagdur við aðrar grunnar, hvørs endamál var at stuðla grønlendskum endamálum vóru 6,1 mill. í honum, ella meira enn tá ið hann byrjaði. Víst høvdu krónurnar ikki sama virði men kortini!

Eftir ein harðan dyst fingu avvarðandi grunnin at rinda fyri eini minnisplátu yvir tey, sum umkomust við Hans Hedtoft.



*Hendan myndin frá Fiskanesi umrødda túrin vísir betur enn orð umstøðurnar, sum eisini hava verið hjá Hans Hedtoft*



*Minningargudstænastan í Holmen Kirke 18. februar 1959. 1.200 vóru til staðar, millum hesi kongur og skiparin á Johannes Krüss, Albert Sierck. 500 av teimum vóru avarðandi. Emmy var ein av teimum*

Plátan var avdúkað av drotningini tann 30. januar 2005. Men tá vóru eisini liðin 46 ár síðan vanlukkuna.

Ein slíkan dag eiga vit at minnast øll ofrini fyri hesa vanlukkur, bæði tey sum fórust og tey sum sótu eftir.

Sosialurin